## Hornkonsert á Glyvrum

Mikukvøldið verður áhugaverd konsert í fimleikahøllini á Glyvrum, har Nes Sóknar Musikkfelag og ein messing kvintett úr Havn, luttaka. Kenneth Joensen, sum er venjari í báðum orkestrunum, fer at stjórna. Skráin hjá hornorkestrinum verður eins og hon, ið verður á Musikkstevnuni í ár, sum verður hildin í Trongisvági komandi vikuskifti. Millum annað verður spæld ein euphonium duett, My And My Shadows, sum Rebekka Hjørleifsdóttir og Anna Magnussen spæla saman við orkestrinum. Konsertin í fimleikarhøllini á Glyvrum mikukvøldið byrjar klokkan 20.



## Mærsk nýtt oljufund

Mærsk Olie og Gas er komið fram á eitt nýtt oljufund í Norðsjónum. Nú skal so metast um, hvørt talan er um rakstrarverdar nøgdir. – Boringin av Bo-3X brunninum var grundað á nýtslu av 3D seismiskum data við høgum upployssningi, og einari innovativari tulking av hesum. Vit bíða nú í spenningi eftir at fáa staðfest, um nóg mikið er til av kolbrintum til at tað loysir seg at útvinna tær, upplýsir varastjórin í felagnum, Anders Würtzen. Tað skrivar blaðið Børsen.

# Fíggjarlóg í komandi viku

**Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, hevur í dag borið uppskot um fíggjarlóg í tingið, og framløga verður í komandi viku**

FÍGGJARLÓGMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur tikið sína tíð at smíða fíggjarlóg fyri árið í ár, men nú er so endiliga komið undir land.

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, vil tó einki siga um, hvussu uppskotið sær út. Hann hevur tó áður sagt, at hansara fíggjarlógaruppskot skal hava eitt avlop, so hóast Karsten Hansen ikki vil leka nakað so skilst, at eitt ávíst avlop verður í uppskotinum.

Spurdur, um landsstýrisfólkini eru nøgd við teirra lut í uppskotinum sigur Karsten Hansen, at tað vónar hann ikki.

- Eru landsstýrisfólkini nøgd, er tað tekin um, at tey hava fingið meiri í teirra lut enn gott er, sigur Karsten Hansen.

Og nakað bendir á, at í hvussu er ikki øll landsstýrisfólkini eru nøgd. Hans Pauli Strøm heldur seg hava fingið alt ov lítið í sín lut.

Sum nevnt verður uppskotið borið niðan í løgtingið í dag, men av tí at tað skal liggja í tinginum í tríggjar dagar til eftirkanningar, kann tað ikki verða lagt fram fyrr enn í komandi viku.

Og ikki fyrr enn tað hendir, ber til at fáa nærri at vita, hvussu ymsu postarnir síggja út. Serliga íløgurnar eru áhugaverdar í fíggjarlógaruppskotinum, tí samgongutinglimir hava áður úttala seg um krøv til fíggjarlógina, og tað er eingin loyna, at serliga sandoyar tinglimirnir vilja hava tunnilsmálið á dagsskrá, skulu teir framhaldandi stuðla samgonguni.

Men alt hetta fæst sum nevnt at vita í komandi viku, tá fíggjarlógaruppskotið verður framlagt.



*Karsten Hansen hevur í dag borið fíggjarlógaruppskotið niðan í tingið, har tað verður framlagt í komandi viku*

## Bankar dømdir fyri kappingarbrot

**Sjey lokalir bankar á Sælandi og Fjóni eru dømdir fyri ólógligar avtalur, sum skuldu forða fyri kapping**

KAPPINGARLÓG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað ber ikki til at hótta limir við útilokan, um teir ikki eru felagstrúgvir.

Tað avmarkar nevniliga kapping. Og heilt ítøkiligt kostar tað nú sjey lokalum bankum á Sælandi og á Fjóni 570.000 krónur í part fyri brot á kappingarlógina. Tað skrivar Politiken.

Fyri einari viku síðani fingu vit eitt uppskot um bót áljóðandi 570.000 krónur. Eftir tí, vit hava verið ígjøgnum, og drúgvu tíðini vit hava nýtt til sakina, hava vit valt at gjalda peningin og koma víðari, sigur stjórin í DiBa, Flemming Jensen.

Teir sjey bankarnir, sum eitt nú høvdu avtalað, ikki at lata deildir upp í høvuðsbýunum hjá kappingarneytunum, eru MønsBank, Lokalbanken í Norðursælandi, Skælskør Bank, Lollands Bank, Vordingborg Bank, Totalbanken í Aarup á Fjóni og DiBa í Næstved.

# Umsitur fleirtjóða sáttmálar

**Tvílandasáttmálar liggja undir teimum ráðum, ið teir náttúrliga hoyra undir, meðan fleirtjóða sáttmálar hoyra heima undir uttanríkisráðnum, segði Høgni Hoydal í svari til munnligan fyrispurning í tinginum í dag**

UTTANRÍKISMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var Jóhan Dahl, sum í munnligum fyrispurningi í morgun spurdi Høgna Hoydal, uttanríkisráðharra, hvørjar uppgávurnar hjá uttanríkisráðnum í veruleikanum eru.

Fyrst og fremst skal hetta nýggja ráð byggja upp eitt infrakervi út í heim, og taka sær av vinnuligum og mentanarligum áhugamálum hjá føroyingum.

- Tvílandasáttmálar, sum eitt nú fiskivinnusáttmálar ella skattligir sáttmálar, liggja undir ávikavist fiskiog tilfeingisráðnum og fíggjarmálaráðnum. Men aðrir fleirtjóða sáttmálar liggja undir uttanríkisráðnum, segði Høgni Hoydal í svari sínum.

Handilssáttmálar verða somuleiðis handfarnir av uttanríkisráðnum, eins og sendistovurnar eru náttúrligur partur av virkseminum hjá uttanríkisráðnum.

Annars fekk Kristina Háfoss eina røð av munnligum fyrispurningum, eitt nú um stuðul til fjarlestur. Tað var Kári P. Højgaard, ið setti spurningin fram, men fleiri aðrir tinglimir tóku eisini orðið í hesum máli.



*Høgni Hoydal umsitur millum annað fleirtjóða sáttmálar*